

# Røktarstarvsfólk til Ellis- og umlættingarheimið

Á Ellis – og umlættingarheiminum eru 25 búfólk og 8 umlættingarpláss.

Søkt verður eftir **sjúkrarøktarfrøðingum** at arbeiða í skiftandi vaktum, svarandi til 1,5 fulltíðarstarv, til setan 1. desember 2008 ella skjótast til ber.

Talan er um sjálvstøðug og avbjóðandi størv, ið fevna um allar tættir innan eldrarøkt. Umframt røktaruppgávur er eisini talan um vegleiðing av starvsfólki og praktikkvegleiðing til lesandi og næmingar.

Starvsstaður er bæði Ellis- og umlættingarheimið, tó so at starvsfólkið fyri tað mesta arbeiðir á annaðhvørt Ellisheiminum ella á Umlættingarheiminum.

**Førleikakrøv**

Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur

Søkt verður eftir 4 **heilsurøktarum** – og ella **heilsuhjálparum.**

Tvey størv sum **heilsurøktari** og ella **heilsuhjálpari** við setunarbrøki 0,7 í skiftandi vaktum, eru leys at søkja til setan 1 desember 2008 ella skjótast til ber. Starvsstaðurin er fyri tað mesta á Umlættingarheiminum.

Tvey størv sum heilsurøktari- og ella heilsuhjálpari á setunarbrøkin 0,7 í skiftandi vaktum eru leys at søkja til setan skjótast gjørligt. Starvsstaðurin er fyri tað mesta á Ellisheiminum.

Talan er um sjálvstøðug og avbjóðandi størv, ið fevna um allar tættir innan eldrarøkt. Umframt røktaruppgávur er eisini talan um vegleiðing av starvsfólki og praktikkvegleiðing til næmingar.

**Vit ynskja røktarstarvsfólk sum**

- hava hug og hegni at arbeiða innan eldrarøkt.
- hava hug til at skapa eitt so heimligt umhvørvi fyri búfólkini sum gjørligt
- eru fleksibil og positiv fyri broytingum og hava góð samstarvsevni
- hava hug og hegni at átaka sær vegleiðingaruppgávur

**Setanartreytir**

Løn og setanartreytir sambært avvarðandi sáttmála og Fíggjarmálaráðið.

Umsøknarfreistin til størvini er 24. november 2008.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan »Størv á Ellis- og umlættingarheiminum«.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Idu Sørensen, leiðara á telefon 31 73 39, ella Helenu Dahl Olesen, deildarleiðara á Umlættingarheiminum, telefon 31 55 22.

**Tórshavnar kommuna**

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Reingerðarfólk til Stuðulstænastuna í Bókbindaragøtu

Søkt verður eftir fólkið at gera reint í skrivstovuhølum í Bókbindaragøtu 8

Arbeiðstíðin er eftir kl. 15 og talan er um 20 tímar um vikuna.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Hermann Mortensen, økisleiðara á tlf. 554048

**Umsókn**
Um hettar hevur tín áhuga so vinarliga send eina umsókn til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Argjavegur 26
Postboks 3037
110 Tórshavn
Stílað: Hermann Mortensen

**Umsóknarfreist: 21. november 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo




## Hesin fitti Opel Kadett B

**er til til sølu. Er fyrstu ferð skrásettur í august 1973 og er í sera góðum standi. Hevur einans koyrt 54.000 km. Hevur havt tveir eigarar, tann fyrra fyrstu 28 árini. Til sølu fyri 22.000 kr**

**Ringið 216409**